# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Kristian Magnussen 50 ár



Í dag, mikudagin 22. februar, fyllir Kristian Magnussen løgtingsmaður í Havn 50 ár.

Kristian er vágbingur, sonur Miu og Eliesar Magnussen.

Kristian er útbúgvin skrivstovumaður og sosialráðgevi. Hann byrjaði sum sosialráðgevi á Almannastovuni, og seinastu mongu árini hevur hann arbeitt sum sosialráðgevi hjá Tórshavnar kommunu, har hann er í farloyvi í løtuni.

Hann hevur verið løgtingsmaður síðan 1994, frá 1994-1998 var hann valdur fyri Verkamannafylkingina, og síðan 1998 hevur hann verið valdur fyri Javnaðarflokkin.

Frá 1996 til 1998 var hann landsstýrismaður umboðandi Verkamannafylkingina.

Hann hevur stóran áhuga í samfelagsligum viðurskiftum og gongur høgt upp sítt starv sum politikari.

Kristian hevur eisini stóran áhuga fyri fótbólti og er Chelsea viðhaldsmaður um ein háls. Hann hevur fleiri ferðir saman við øðrum verið í Onglandi og hugt at dystum, tá Chelsea spælir. Í føroyskum fótbólti er tað nokk VB, sum stendur hansara hjarta næst. Sjálvur hevur hann spælt flogbólt í mong ár. Hann er eisini tónleika áhugaður og heldur nógv av danska bólkinum „Gnags".

Kristian er giftur Bjørg Róin úr Havn. Tey eiga trý børn: Rúni, 33 ár, Sharda, 23 ár, og Bogi, 18 ár. Rúni og Sharda búgva í Keypmannahavn. Eisini eiga Bjørg og Kristian abbasonin Mattias, sum tey ganga sera høgt uppí, og ikki at gloyma hundin, Golden Retrievarin „Chico".

## Quizvinnarar hugnaðu sær

Vinnarinir av fyrsta høvðusvinninginum í Pub Quiz í Café Natúr »Team Breyð« vóru ein rimmar býtúr í vikuskiftinum.

Skilagóðu breyðini fóru við limosinu í Bowling Høllina, har teir bowlaðu seg svangar. Síðan gekk leiðin niðan á Hotel Föroyar, har borðreitt var við fýra røttum. Aftan á matin koyrdi limosinan Team Breyð oman í REX, har VIP rúmið bíðaði við ókeypis drykkjuvørum.

Í kvøld verður so fari undir 2. umfarið av Pub Quiz. Høvðusvinningurin hesu ferð er eitt á loftinum í Café Natúr. Har fær vinnarin rúm fyri seg sjálvan og egnan kokk. Kokkurin Uni Gullfoss ger eina serliga 6 rætta matskrá við víni. Aftaná er ókeypis atgongd hjá vinnarunum í bæði Rex og Eclipse.

So Pup Quiz er aftur hvørt mikukvøld kl.21.00

**nud**



*Quizvinnararnir frá vinstru: Hallur Poulsen, Leivur Holm, Eyðun L. Samuelsen, Petur Egholm og Eyðun Húsgarð*

**Dagurin í morgin**

**23. februar. Papias**, deyður umleið ár 150. Var biskupur í Hierapolis í Frýgiu í Lítluásiu. Sigst at hava havt samband við ápostulin Filippus.



Tórshavnar alfrøði:

## Konfirmantar í apríl 1926

Konfirmantarnir 11. apríl 1926. Aftasta rað, f.v.: ókendur, Johanne Olsen (Velbastaður), ókend, Jon Jakobsen (Nólsoy), ókendur, Hans Marius Hansen (Havn), ókend og Aage Dal Mikkelsen (Havn).

Fremra rað f.v.: ókend, Helene Marie Jacobsen (Havn), ókend, Elisabeth Oluffa Joensen (Havn), ókend, Valborg Anna Marie Næs (Havn), Hanne Jensine Gudrun Olsen (Havn) og ókend.

Tær genturnar, sum ikki eru navngivnar á myndini, eru: Hansine Helene Sofie Dam, Signhild Ellinor Joensen, Anna Ellingsgaard, Borghild Hjalt, Andrea Kristine Viðstein, Frida Maria Hansine Vilhelmsen og Johanna Maria Poulsen, allar úr Havn og so Olivia Holm úr Nólsoy. 11 gentur eru á myndini, og 13 blivu fermdar.

Dreingirnir, sum ikki eru navngivnir á myndini, eru: Clement Jacobsen, Ludvig Hallgrím Niels Christiansen Rein, Johan Kristian Poul Nikolaj Højgaard, allir úr Havn og so Finn Winther (Klaksvík) og Tórir Zachariasen (Hestur). 8 dreingir blivu fermdir hendan dagin og bert 5 eru á myndini.

Vit fara so inniliga at heita á lesararnar um at gera vart við seg, um teir vita hvør er hvør. Vinarliga ringið til Birgar Johannessen á tlf. 314647 ella 214647.

